DAGSINS MEINING

Fólkaumsorgan ella desperatión?

Tað er ikki eiti á fólkaumsorgan og umhvørvisumsorgan, ið Fíggjarálaráðharrin leggur fyri dagin í nýggju fíggjarlógini. Avgjald skal leggjast á góðgæti og plastikkposar. Orsøkin er sambært samgonguni sjálvandi ikki, sum man annars kundi havt illgruna um, at landskassanum tørvar meiri inntøkur. Nei, fólkaumsorganin er komin í hásæti, og tí skulu góðgæti og plastikkposar fáa eitt avgjald. Hví gularøtur so ikki gerast bíligari, kann man kanska undrast yvir, men lat okkum lata ivan koma samgonguni til góðar.

Umsorgan fyri livikorunum hjá teimum eldru og umsorgan fyri umhvørvinum vóru samantvinnað í bjálvingarstuðulinum og stuðul til orkusparandi tiltøk. Hesin stuðul var latin til pensionistar, til Karsten Hansen skar hann burtur í 2001. Nú tá umhvørvisumsorgan og fólkaumsorgan er komið aftur í hásætið, so er neyvan nakað argument fyri ikki at lata bjálvingarstuðul og stuðul til orkusparandi tiltøk. Hesin stuðul, ið kostaði áleið átta milliónir í 2000 skuldi brúkast til bjálving, skiftan av tekju, skiftan av rútum, oljufýring o.s.fr. Ilt er at seta tal á, hvat gagn hesin stuðul hevur gjørt, men tað er eingin ivi um, at stuðulin hevur hjálpti til, at pensionistar hava kunnað sitið longri í egnum bústaði. Hetta er í tráð við føroyskan eldrapolitikk, og hevur ivaleyst gagnað í einari støðu, har tað er mangul uppá røktarheimspláss.

Við at geva pensionistum møguleika at skifta vindeygu og bjálva gomul hús ordiliga, spara pensionistarnir pening til olju, og umhvørvið verður avlastað. Tá man hugsar um føroyska útlátið av koldioxid, so er ilt at síggja, hvi eingin upphædd er til bjálvingarstuðul á fíggjarlógini fyri 2004. Við tí nýggja Karsten Hansen, ið hevur stóra umsorgan fyri fólkaheilsuni og umhvørvinum, so man tað helst verða eitt forgloymilsi, at eingin upphædd er til bjálvingarstuðul og stuðul til orkusparandi tiltøk á fíggjarlógini. Ein onnur ábending um, at hetta er forgloymilsi er, at umsóknarbløðini til bjálvingarstuðul og orkusparandi tiltøk framvegis eru at fáa frá Húsalánsgrunninum, og neyvan letur man slíkt til borgarar bert fyri at arga, uttan játtan á fíggjarlógini í 4 ár á rað.

Koldioxid útlátið fer niður, og pensionistar kunnu sita bíligari og longri í egnum húsum við at seta bjálvingarstuðulin og stuðul til orkusparandi tiltøk aftur á fíggjarlógina. Tær 8 milliónirnar, ið hesin stuðul kostar, um onkur vil meta lívsgóðsku hjá pensionistum og umhvørvisbatar í kronum og oyrum, kundu hóskandi verið spardar og væl afturat við at minkað talið av stýrum úr nýggju niður í seks, sum skotið verður upp av andstøðuni.

Um nýggju avgjøldini hinvegin ikki eru úrslit av fólkaumsorgan og umhvørvisumsorgan, men bert skal síggjast sum eina síðstu roynd at skava nøkur oyru afturat í landskassan, so líkist hetta mest av øllum eina desperata roynd at fáa fíggjarlógina fyri 2004 at hanga saman. So er ikki nógv at heinta í núverandi samgongu hja teimum, ið veruliga hava fólkaumsorgan og umhvørvisumsorgan.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Meðan vit bíða eftir eini samanlegging …

Jákup Mikkelsen

Fyrimunir og vansar við eini samanlegging av ÚF og SvF mugu sjálvandi kannast, áðrenn endalig støða verður tikin til samanlegging.

Eftir at hava heitt á mentamálaráðharran um at kanna fyrimunir og vansar við eini samanlegging av ÚF og SvF, var høvi at luttaka í sendingini Fokus í SvF. Síðani tá, hevur Mikkjal Helmsdal, stjóri í SVF skrivað drúgva grein í bløðunum um samanlegging av teimum báðum almennu loftmiðlunum.

Lat meg fyrst takka SVF stjóranum fyri rættleiðingarnar! Vit kunnu óivað øll koma út fyri at gera í so nógv av, og tað haldi eg, at Mikkjal Helmsdal eisini ger í síni egnu blaðgrein.

Eg skal eisini takka tær fyri, at tú viðgongur at nógv talar fyri at leggja SVF og ÚF saman. Tú nevnir fleiri góð argument í grein tíni, eitt nú gongdina í Noreg á lokalregi. Loftmiðlarnir í grannlongdum okkara virka saman, men sjónvarp og útvarp hava hvør sína redaktión. Hóast stovnarnir eru atskildir í Svoríki, eigur sama partafelag stovnarnar, og hesir hava bygningar, telefonvekslarar/-damur o.a. í felag.

Við einans 48.000 íbúgvum er neyvan fíggjarligt grundarlag fyri at hava tveir atskiltar stovnar í Føroyum. Vit mugu leggja stovnarnar saman og fáa spart dupultfunktiónir burtur.

Ein hvør er sær sjálvum nærmast, og tað er kanska júst tí, at tú roynir at verja títt "kongaríki". Hetta ger tó argumentatiónina rættliga subjektiva. Sjónvarpsstjórin kann ikki vísa á nakra sparing við samanlegging. At tosa um sparingar á almennum stovnum er sum at stinga hondina í eitt vespureiður, – men samstundis halda flest øll at samfelagið er ov dýrt rikið

Vit eru samdir um, at tað í høvuðsheitum eru tvinni høvuðsmál í eini samanlegging:

»Góðska og kostnaður«

Mín vón er, at áheitan mín á Annitu á Fríðriksmørk fær undirtøku og at hon setur serkøn fólk at kanna fyrimunir og vansar við eini samanlegging. Eg eri rættuliga vísur í, at ein samanlegging er tað einasta rætta. Tað kunnu framvegis verða tvær redaktiónir, men nógv annað er at verða felags um. Fáa vit ein betri og biligari loftmiðil, ja so kunnu vit lækka lurtara- og hyggjaragjaldið, sum er alt ov dýrt í dag.

Var í síðstu viku fyri fyrstu ferð inni í SVF. Eg má siga at umstøðurnar eru sera vánaligar at síggja til. Tá Mikkjal Helmsdal skrivar um, at sendinetið er niðurslitið og tann tøkniliga útgerðin eisini trongir til at skiftast út, so er henda støðan eisini ein orsøk til at leggja saman.

Eg taki undir við at játta pening til ílogur í bygning og útgerð, treytað av, at stovnarnir verða lagdir saman og koma at virka undir sama taki. So er bara at vóna at Annita á Fríðriksmørk sær hetta sum ein møguleika.

Barnadansurin byrjar aftur

TÍÐINDASKRIV
Norðurlandahúsið

Í vetur verður aftur skipað fyri Barnadansi í Norðurlandahúsinum og er hetta 20. árið á rað og harvið drúgvasta tiltakið í søgu húsins.

Byrjað verður fríggjakvøldið 10. oktober kl. 20.00

Endamálið við hesum tiltaki er at læra børnini kvæðaskap okkara og harvið kveikja teirra áhuga og varveita kvæðini, sum ein livandi part av mentan okkara.

Tað er Dansifelagið í Havn og Norðurlandahúsið, sum øll tjúgu árini hava skipað fyri barnadansinum í dansistovuni í Norðurlandahúsinum.

Vónandi møta børn og foreldur fjølment upp.

Amariel í Focus

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 10. oktober kl. 16 letur Amariel Norðoy upp listaframsýning í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn. Mikladalur og tað skiftandi ljósið er tema fyri hesi framsýning. Framsýningin verður opin til 24. oktober. Týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

»Berufsverbot fyri rækjuflotan«?

Jákup Egholm Hansen

Destruktivur leikur hjá Sjónvarp Føroya.

Samstundis sum stóra arbeiði hjá Zakaris Hammer um áhugaverdu føroysku rækjusøguna er farið av bakkastokki uppliva vit tað óvæntaða, at fleiri føroyskir politikarar standa í kø fyri at sleppa framat sum leikarar í tí sum eg síggi sum eitt uppsett leikrit hjá destruktivu journalistisku kreftunum í serliga Sjónvarpi Føroya, har endamálið er at verða so fordømandi, niðurgerandi og mistonkiligerandi sum møguligt av ein av aktørunum í føroysku rækjuvinnuni. Hesar journalistisku kreftir eru eftir mínum tykki "tíðinda-skaparar" og ikki "tíðinda-berarar". Tað sum undrar einamest er, at hetta eru nógvir av somu politikarum sum hava vístein fullkomna líkasælu um støðuna hjá rækjuflotanum, hóast reyðu lampurnar hava blinka í fleiri ár, og hóast eitt ótal av ávaringum frá vinnuni. Sjálvt ein nágreinlig kanning av professionellum búskaparfrøðingum fyrr í ár, sum lýsti týðningin av rækjuvinnuni fyri føroyska búskapin, fekk bert flestu politikarar at yppa øksl, og leggja illa skøvaðu plátuna um 80´árini, studning o.a. á einaferð afturat. Men nú talan er um at finna hættir at leggja forðingar fyri vinnuna er uppfinnsemi, áhugið og markeringstrongd teirra munandi størri.

Øll øsingin stendst av tí einføldu orsøk, at eitt av reiðaríunum í hart kroysta rækjuflotanum finnur eina neyðloysn á sínum trupulleikum, við at fara undir eina tíðaravmarkaða útflagging.

Tíðaravmarkað útflagging onki nýtt

Ein politikari segði, at landsstýrið og løgting skuldu syrgja fyri at noktað rækjuskipum at flagga út soleiðis at hetta ikki kom at verða fordømi fyri onnur skip. Eitt slíkt stig minnir ikki sørt um eitt annað ódámligt fyribrygdi sum fanst í Týsklandi fyri nøkrum árum síðani — "Berufsverbot". Men hesin politikarin man fylgja lítið við hvat hendir í føroysku fiskivinnuni, tí tað einasta føroyska reiðarii fyri fiskiskip sum tað almenna sjálvt eigur — JFK-Trol - hevur í fleiri ár havt okkurt av skipum sínum undir polskum flaggi í avmarkað tíðarskeið, og hevur í løtuni ein rækjutrolara undir grønlendskum flaggi, sum teir eiga saman við øðrum. Hetta almenna reiðarií var, eins og nakrir rækjutrolarar, bjarga av eini kreppuloysn fyri nøkrum árum síðani, tá landskassin stovnaði Føroyagrunnin. Ongin politikari hevur nakrantíð tikið uppá tungu, at hetta almenna reiðarií ikki mátti troyta møguleikar undir øðrum flaggi og við útlendingum umborð eisini. Sjálvur haldi eg, at JFK sjálvandi skal hava loyvi til tíðaravmarkaðar útflaggingar. Og sjálvandi skulu øll onnur føroysk fiskiskip hava sama møguleika — eisini Arctic Viking og aðrir rækjutrolarar.

Karmanir ikki nøktandi

Vinnan hevur ikki tørv á at politikarar leggja forðingar, tí tað at slíkar verkætlanir yvirhøvur eru neyðugar er tí at teir karmar sum føroysku politikararnir hava kunna útvega fiskiflotanum ikki eru nøktandi, so ongin politikari kann loyva sær at finnast at slíkum verkætlanum uttan so at hann hevur nakað betur at bjóða. Og hinvegin má tað sigast at verða beinleiðis ómoralskt, um ávísir politikarar halda at einans tað einasta almenna reiðarií skal fáa slíkar sømdir.

Meirnýtslan til Løgtingshúsið hevði bjargað rækjuflotanum

Tá onkur politikari tosar um, at trúvirði hjá politikarunum stendur uppá spæl í málinum um Arctic Viking, nýtist honum ikki at stúra fyri tí, tí aftaná gøluna um Løgtingshúsið, sum politikarar hava roynt at snúgva sær undan við at geva einum arkitekti skylduna, er ikki vist at politiska trúvirði er so øgiliga høgt í metum millum manna. Forrestin vildu hasar uml. 50 mill. sum løgtingslimir hava játtað sær eyka til finar skrivstovur gjørt undurverkir í rækjuflotanum — ja, høvdu helst bjargað teim flestu av hesum arbeiðsplássum í fleiri ár fram.

Handilsskapur og vinningsbýtið

Onkur annar politikari tosar um vánaligan handilsskap, at nakrir eigarar hava fingið vinningsbýtið. Men hvat er yvirhøvur endamálið við eini íløgu í skip ella okkurt annað vinnuligt virksemi ?. Er tað ikki júst at fáa eitt avkast sum er størri enn innskotið?. Í mínum hugaheimið er tað í øllum førum uppaftur vánaligari handilsskapur um tað ikki er endamálið at fáa eina íløga at kasta nakað eyka av sær. Hesin politikarin skal minnast til, at tað almenna kravdi av eigarunum í samband við skuldarumleggingina hjá rækjuskipum, at teir innsettu meira eginpening. Og hví skuldi nakar gjørt tað um tað var forboðið at fáa íløguna innaftur? Og munnu ikki nógv skip í heimaflotanum sum fingu almenna sanering fyrst í 90´unum eisini hava útlutað vinningsbýtið í seinastu góðu árunum? Vónandi hava teir tað.

Handlið í staðin fyri at tosa

Bert ein politikari hevur higartil sagt ein einkultan setning um hetta mál sum gevur nakra meining, og var tað at løgting og landsstýrið máttu kannað um tað ikki var onkur annar háttur at loysa trupuleikarnar í rækjuvinnuni uppá, enn at latað skipini flagga út, og harvið missa bæði inntøkur og arbeiðspláss. Eg tori at pástanda, at øll reiðariir helst vilja sleppa undan at flagga út ella selja síni skip, og vinnan hevur í áravís skríggja eftir at politikarar vaknað og takað trupulleikarnar í álvara, so vónandi vil hesin politikarin syrgja fyri, at hetta ítøkiliga málið verður brúkt til at trupulleikarnir umsíðir verða tiknir upp til viðgerðar.

Fyribrygdi Tór+Bjørn

Meðan tað er rættuliga óvæntað at so nógvir politikarar vilja luttakað í destruktiva sjónleikinum hjá Sjónvarpið Føroya, og vilja leggja vinnuni forðingar heldur enn at útvega nøktandi karmar, er hinvegin lítið óvænta í, at republikanski politikarin av Glyvrum, hvørs politisku avrik søgan helst fær lættari við at máta í decibel enn í veruligum avrikum, luttekur í rópikórinum, tí tað ræður jú um at verða "politiskt korrektur" í eygunum hjá almenninginum. Samstundis er tað als onki óvæntað í, at fjølmiðlatilnevnda løgfrøðiliga flogviti av Heygum í Vestmanna, sum hevur "oyna klokkuklára moyning" um moralin og feilirnar hjá øllum øðrum, enn hjá sær sjálvum, loypir upp sum trøll úr eini eskju, tí tað ger hann jú automatiskt hvørja ferð onkur journalistur tímir at opna lokið.

Saneringslógin avskeplaðist

Júst hesin seinni eigur eftir míni fatan sín stóra part av skuldini fyri at lógin um umlegging av lánum hjá fjarfiskiflotanum bleiv eitt misfostur, sum hevur skapað trupuleikar fyri bæði skip og landsstýrið líka síðani hon kom. Tí meðan upprunaliga uppskotið frá landsstýrismanninum var eitt vælmeint og skilagott uppskot sum gekk út uppá at javnseta fjarfiskiflotan við heimaflotan, sum so at siga allur fekk eina almenna sanering fyrst í 90´unum, so megnaði hesin maður, sum í 1997 var politikari og limur í Vinnunevndini, saman við øðrum at avskepla hesa lóg soleiðis at fjarfiskiflotin ikki bleiv javnsettur við heimaflotan, og tað meti eg at verða eitt løgrøðiligt avrik sum eigur at fáa dumpikarakter.

Løgin saneringin sum økti um byrðarnar

Henda avskeplaða lógin gjørdi, at í onkrum føri sótu skip sum skuldu eitast at verða saneraði eftir við eini størri skuld at forrentað, enn tey kláraðu áðrenn lógin kom, so tað má sigast at verða ein løgin sanering. Og at sokallaða serfrøðinganevndin tyktist leggja seg mest eftir at gera tað sum Bjørn á Heygum og aðrir søgdu verða "politiskt korrekt", og ikki vildi ella tordi at lurta eftir ávaringum um, at fyritreytir teirra í málsviðgerðini vóru óveruliga bjartskygdar, og als ikki tóku hædd fyri møguligum prísfallum o.a. staðfestir bert, at hesi málini fóru av sporinum longu frá byrjan av. Í dag kann bert staðfestast, at skuldarumleggingin als ikki var nøktandi, hóast tað var ein treyt í lógini sum serfrøðingarnir og landsstýrið áttu at taka fyrilit fyri, og m.a. tí er støðan hjá hesum saneraðu skipum so vánalig sum hon er. Og tann heiðurin at lógin ikki kom at virkað kunnu vit takka Bjørn á Heygum, Heina í Kunoy og øðrum politikarum sum í 1997 vóru við til at avskepla lógina fyri.

Komið niður á jørðina aftur

Vónandi koma politisku sjónleikararnir í leikinum hjá Sjónvarpið Føroya niður aftur á jørðina, og fara ikki at leggja seg út í detailstýring av vinnuna. 80-árini vístu hvat spurdist burturúr tí. Smoyggi heldur uppum ermar og fari í holt við at loysa trupuleikarnar, og gevið orðunum um "vinnuligar karmar fyri rækjuflotan" eitt veruligt innihald

Nú kenni eg meg rættuliga sannførdan um, at tær destruktivu journalistisku kreftir í Sjónvarpinum, sum eg her havi funnist at, fara at svara aftur á ein ella annan hátt. Men nú vita so øll hví.

Trier møtir Kidman í Dogville

Nicole Kidman hevur høvuðsleiklutin í "Dogville" (Lars von Trier 2003), sum KLIPP sýnir í Norðurlandahúsinum mikukvøldið

TÍÐINDASKRIV

Klipp Filmsfelag Norðurlandahúsins fer nú undir vetrarskránna. Allar sýningarnar verða í Høllini í Norðurlandahúsinum mikukvøld klokkan 20, har Gardar Hall fer at vísa filmarnar. Fyrsta sýningin verður komandi mikudag hin 15. oktober og hin seinasta verður mikudagin 14. apríl.

Dogville er heitið á fyrsta filminum hjá Klippi í vetur. Hetta er nýggi filmurin, frumsýndur í ár, hjá kendasta danska leikstjóranum Lars von Trier.

Høvuðsleiklutin hevur Oscarvinnarin Nicole Kidman. Filmurin er hin næsti í røðini eftir Dancer in the Dark, sum við íslendsku Björk í høvuðsleiklutinum fekk Gyltu Pálmarnar í Cannes 2000. Eins og í undanfarnu filmum Triers er tað Vibeke Windeløv, ið er framleiðsluleiðari fyri danska felagið Zentropa Productions.

Dogville er um hina vøkru Grace (Nicole Kidman), sum rýmir undan brotsmonnum og kemur til fjarløgdu bygdina Dogville. Unga skaldið Tom (Paul Bettany) fær bygdarfólkið at fjala hana, men so skal hon eisini arbeiða afturfyri.

Tá løgreglan fer at leita eftir Grace, vil bygdarfólkið - og serliga menninir í Dogville - hava meira aftur fyri, skulu tey framhaldandi fjala rýmingin.

Nú má Grace endurskoða hugsanina um góðsliga fólkið á bygd. Men samstundis veit hon eitt loyndarmál, sum, kemur tað fram, verður vanlukkuligt, ikki bara fyri hana, men sanniliga eisini fyri alt fólkið í Dogville.